


Tænastan á Smyrli skal hækkast munandi, og á øllum økjum skal tann ferðandi setast í miðdepilin. Ein grundleggjandi hugburðarbroyting skal gjøgnumførast á okkara stásiliga flaggskipi, og tí verður søkt eftir einum tænastuleiðara, ið hevur evnini og viljan at fremja broytingarnar.

**Starvið**
Tænastuleiðararnir umborð á Smyrli skulu tryggja eina professionella kundatænastu á høgum stigi umborð. Tað at sigla skal verða ein uppliving í sær sjálvum, og myndaliga talað skal tað kennast sum at koma á hotell, har hugsað er um øll – børn, vaksin og gomul.

Starvsfólkini i vistaveitingini hoyra undir tænastuleiðaran. Tænastuleiðarin hevur ábyrgdina av rakstrinum av kafeteriu, kiosk, reingerð, fundarhølum og størri tiltøkum, og saman við fyrstakokki hevur tænastuleiðarin vøruinnkeyp og vørugoymslu um hendi.

**Umsøkjarin**
Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir innan tænastuvinnuna. Hevur tú arbeitt sum hovmeistari, yvirtænari ella leiðari á hotelli, eru vit sera áhugað.

Vit leggja stóran dent á leiðsluroyndir og viljan og evnini til at royna nýggjar leiðir. Ein umráðandi eginleiki er ein professionellur hugburður, har dentur verður lagdur á trivnaðin hjá tí einstaka ferðafólkinum. Tænastuleiðarin má verða dugnaligur at skapa nýggjar inntøkur og effektivan rakstur.

Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til mat, mugu vera vanir at brúka teldu og vera málsliga væl fyri. Góð samstarvsevni og evnini at kveikja sínar starvsfelagar eru ein fortreyt, skulu úrslit røkkast. Neyðugt er at hava heilsuprógv og trygdarskeið.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt sjálvstøðugt starv við spennandi fakligum avbjóðingum. Starvið sum tænastuleiðari er nýtt, og tí sleppur tú sjálv/ur at skipa og menna innihaldið í starvinum.

Smyril er nýggjasta skipið í flotanum. Hann hevur fingið viðurkenning fyri sítt snið, og arbeiðsumstøðurnar umborð eru frálíkar.

Arbeitt verður í skiftum, og tú kemur at arbeiða aðru hvørja viku og hava frí aðru hvørja viku. Setanartreytirnar verða annars skipaðar sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn og freist**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Heina á Borg, deildarleiðara, telefon 54 30 61 ella e-post: hab@ssl.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. desember klokkan 12. Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

Strandfaraskip Landsins
Starvsfólkadeildin
Boks 88
110 Tórshavn

sansir.fo

Strandfaraskip Landsins fevna um Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir, sum skulu lúka landsins tørv á fólkaflutningi. Fyritøkan skal mest gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi. Stórar broytingar eru hendar á Strandfaraskipum Landsins seinnu árini, og víðfevndar menningarætlanir liggja fyri stavn. Millum hesar kann nevnast ein framhaldandi uppstiging og endurnýgging av tænastukervinum á sjógvi og landi.

STRANDFARASKIP LANDSINS



Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Á 16 privat- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið Inni og Eik bank. Í samtakinum starvast 259 fólk og á deildini í Hornabø starvast í løtuni 10 fólk.

# Kundaráðgevi til avbjóðandi starv í Hornabø

Vit sóknast eftir kundaráðgeva til deild okkara í Hornabø.

Sum kundaráðgevi fært tú stórar avbjóðingar í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á deildini.

**Starvið**
Fremsta uppgávan verður at veita kundanum heildarráðgeving. Dentur verður lagdur á ráðgeving um øll viðurskifti av týdningi fyri kundan, m.a. innlán, útlán, pensjón, íløgur, tryggingar og gjaldsmidling.

**Uppgávurnar hjá tær fevna um**
– ábyrgd og røkt av egnum kundum
– heildarráðgeving og søla
– kredittviðgerð
– ymiskar ad-hoc uppgávur

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja okkum ein jaligan starvsfelaga við góðum samstarvsevnum, hugi og evni at arbeiða við kundum, og sum kann ganga undan.

Vit vænta, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi, og at tú hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi.

**Fakligir eginleikar**
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og løn verður ásett sambært avtalu.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Sæunn L. Petersen, økisvaraleiðara, tel. 348020, teldupostur saunn.petersen@sparikassin.fo ella við Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel. 348510, teldupostur marjun.eystberg@sparikassin.fo

Umsókn skal vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. desember 2006.

Send umsóknina til:
Føroya Sparikassi
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

VASTI 459010

FØROYA SPARIKASSI